# Bugatti 100 ár

Bugatti verksmiðjan varð sett á stovn av Ettore Bugatti, sum var italienari. Bugatti vórðu skjótt kendir fyri sínar eksklusivu og sportligu bilar við stórum motorum. Bugatti verksmiðjan framleiddi bilar til síðst í 50-unum, tá hon kom í fíggjarligar trupulleikar og mátti gevast við framleiðsluni av bilum. Í 1998 keypti VW-konsernin rættindini til framleiðslu av Bugatti, og í 2005 kom tann kendi "ekstremi" sportbilurin Bugatti Veyron EB 16.4 við yvir 1000 hestakreftum og eini toppferð upp á 407 km/t á marknaðin. Í sambandi við 100 ára stovningardagin eru nakrir sergjørdir Bugatti Veyron í heilt serligum litum framleiddir.



# 1.000 færri fáa løn

Í Norðoyggjum eru talið av løntakarum minkað sløk 10% hetta seinasta árið. Tað skrivar Hagstovan á heimasíðu sínari. Samlaða talið av løntakarum var í apríl mánaði í ár 25.195, og eru hetta á leið 1.000 færri, enn tað var í apríl mánaði í fjør. Hetta svarar til 3,6%. Nógv tann størsta afturgongdin er í Norðoyggjum, har talið av løntakarum er minkað 9,9% hetta seinasta árið. Minsta afturgongdin er í Suðurstreymoy, har talið av løntakarum minkaði 1,7%.

# Nýggja krímið kann kosta milliónir

**H1N1 krímið kann koma at kosta føroyska samfelagnum eitt stað millum 30 til 40 milliónir krónur í mistari inntøku**

SJÚKA
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*



*Umleið 13.000 føroyingar – tað er fjórði hvør - væntast verða raktir av sjúkuni, áðrenn hon er doyr út. Hetta kann fara at kosta samfelagnum og vinnulívinum einar 30 til 40 milliónir*
*Tilgjørd mynd*

Tað kann gerast ein dyggur frammaná, tá sjúkradagarnir orsakað av H1N1 kríminum skulu gerast upp.

Verða somu tøl galdandi fyri Føroyar, sum fyri Danmark, kann samlaði kostnaðurin fyri føroyska samfelagsbúskapin koma at liggja eitt stað millum 30 og 40 milliónir krónur.

Tað vísa tøl, ið eru gjørd við støði í útrokningum hjá Dansk Arbejdsgiverforening og hagtølum frá Hagstovuni.

Tølini vísa, at talan kann gerast um 25- 30.000 fleiri sjúkradagar enn vanligt hjá teirri føroysku arbeiðsfjøldini, sum í 2008 taldi 29.430 fólk, verður fjórði hvør raktur av H1N1 kríminum.

Fleiri ting eru tó, ið gera at hesi tølini skulu takast við fyrivarni.

Eitt nú kann tað ávirka nógv, júst nær fólk gerast sjúk.

Erarbeiðsgevarin so heppin, at arbeiðstakarin gerst sjúkur um eitt vikuskifti, er missurin tann minsti, meðan ringasta føri er, at arbeiðstakarin gerst sjúkur ein mánadag og liggur sjúkur alla vikuna.

Eisini er útrokningin gjørd við støði í donskum tølum, tá eingi føroysk hagtøl fyriliggja um kostnaðin á einum sjúkradegi. Føroyska bruttotjóðarúrtøkan (BTÚ) er eitt lítið vet lægri enn tann danska, sum donsku tølini taka støði í.

Men við teimum fyrivarnum, sum eru, er ikki óhugsandi, at talan kann gerast um ein samlaðan miss fyri føroyska samfelagið, ið liggur eitt stað millum 30 og 40 milliónir krónur.

### Brynja seg til epidemi

Í Danmark leggur felagið Dansk Industri upp til at fyritøkur gera eina tilbúgvingarætlan, har tey eitt nú skulu fáa fleiri at arbeiða heimanífrá, snýta video- og telefonkonferansur í staðin fyri ferðir og gera herferðir fyri reinføri, til tess at sleppa undan at smittan breiðir seg.

Danska Heilsustýrið væntar at umleið 1,5 millión danir verða raktir av H1N1. Hetta svarar til at umleið 13.300 føroyingar verða raktir av sjúkuni, áðrenn hon er hæsað av.

## Tríggir tilburðir staðfestir um vikuskiftið

Tríggir nýggir tilburðir av H1N1 krími eru staðfestir um vikuskiftið. Tað boðar Bjarni á Steig, virkandi landslækni, frá.

Talan er um ein persón, ið hevur samband við fyrstu smittukelduna, sum er flogfarið, ið lendi í vágum 7.juli klokkan 14, og um tveir aðrar persónar, ið hava eru komnir heim úr evropeiskum londum.

Sostatt er samlaða talið av tilburðum í Føroyum, nú komið upp á 14, og er talan um fleiri ymiskar smittukeldur.

Hósdagin vóru 53 fólk kannað, og væntar landslæknin at tað talið nú er komið upp um 100 fólk, ið hava latið seg kanna. - Men enn eru so bara 14 tilburðir staðfestir, boðar Bjarni á Steig, virkandi landslækni frá.

**-rn**

# Portal.fo nýggjan ham í morgin

**Føroya mest vitjaði portalur fær nýtt snið og fleiri funktiónir. – Hann verður meira brúkaravinarligur og munandi penari at síggja til, sigur Óli á Deild Olsen, leiðari á FT Online, sum umsitur portalin**

PORTAL.FO
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*



*Verandi snið á Portal.fo fer í søguna á middegi í morgin. Tá verður Portalurin ein nýggjur, meira brúkaravinarligur og snøggari portalur at síggja*
*mynd: Snapshot*

Á middegi í morgin verður Føroya størsti portalur, Portal.fo, givin út av nýggjum. Talan verður bæði um eitt nýtt snið og fleiri funktiónir.

- Vit hava gjørt eitt nýtt layout, sum er meira brúkaravinarligt, og sum er nógv penari enn tað, vit kenna nú. Ongar funktiónir verða strikaðar, men ymsar funktiónir verða fluttar, sigur Óli á Deild Olsen, leiðari á FT Online, ið umsitur Portal.fo.

### Tíðindini á Facebook og Twitter

Umframt at fáa eina størri umvæling í útsjóndini, verður talan eisini um fleiri funktiónir, ið verða knýttar at Portal.fo, sum árið líður.

- Eitt nýtt verður at fólk kunnu melda seg inn í Facebook ella Twitter bólkin hjá Portal.fo, og at so verða yvirskriftirnar lagdar út sum status, greiðir Óli á Deild Olsen frá.

### Fleiri bólkar av tíðindum

Ein onnur broyting sum verður at síggja, er at tíðindini nú verða betri flokkaði. Hetta fer at gera tað lættari hjá fólki at finna tey tíðindini, ið hava teirra áhuga.

- Framyvir verða uttanlandstíðindi fyri seg, innanlandstíðindi fyri seg, ítróttur fyri seg og so framvegis, greiðir Óli á Deild Olsen frá.

- Eisini verður ein nýggj live-síða til fótbólt og aðrar ítróttakappingar, sum eru í gongd, soleiðis at hetta ikki verður lagt út sum nýggj tíðindi, men verður leypandi uppdaterað, sigur hann.

- Vit hava eisini fingið føroysku partabrøvini og føroyska vísitalið inn á Portalin, og tað er nakað nýtt, sigur Óli á Deild Olsen.

### Meira kemur seinni

Henda broytingin, sum verður at síggja í morgin, er bert byrjanin á eini størri umvæling av portalunum hjá Føroya Tele.

Talan er um Portal.fo, sportal.fo, planet.fo, nummar.fo og fleiri, sum næstu tíðina leypandi verða umvældar, fáa nýtt snið og nýggjar funktiónir.

- Hetta er bara tað fyrsta, sum lesarirnir sleppa at síggja ordiligt, sigur Óli á Deild Olsen, leiðari á FT Online.